VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Havsins margfeldni

Tað eru nú nøkur ár síðan, at lond í Noðruratlantshavi, sum veiða hval og kóp, skipaðu felagsskapin NAMMCO - North Atlantic Marine Mammal Commission. Talan er sum kunnugt um altjóða felagsskap, ið hevur til endamáls at skipa fyri samstarvi um varðveiting, gransking, og umsiting av súgdýrastovnum í Norðurhøvum. NAMMCO sáttmálin varð undirritaður í Nuuk tann 9. apríl 1992 av Noregi, Íslandi, Grønlandi og Føroyum. Í næstu viku verður ársfundur hjá NAMMCO hildin í Tromsø í Noregi. Umframt limalondini luttaka Kanada, Japan, Danmark og Russland sum eygleiðarar, og fundurin verður týsdagin, mikudagin og hósdagin, sigur Fiskimálaráðið í tíðindaskrivi. Á fundinum fer vísindanevndin hjá NAMMCO at leggja fram niðurstøður og tilmæli um ymsar hvala- og kópastovnar. Hetta eru niðurstøður og tilmælið, sum NAMMCO hevur biðið um, kann føra til nýggja stovnsmeting.

Vísindanevndin hjá NAMMCO skipar fyri hvalateljing komandi summar, og hetta verður mest umfatandi hvalateljingin higartil. Umframt øll NAMMCO limalondini, fara eisini Kanada og Russland at vera við í teljingunum hesaferð. Úrslitini av teljingunum kunnu føra til, at stovnsmetingin av grindahvali á okkara leiðum skal endurskoðast. Føroyar hava havt formansskapin í NAMMCO síðan 2004, tað er Kate Sanderson, serfrøðingur í Fiskimálaráðnum, sum er forkvinna. NAMMCO hevur síðan stovnsetingina fyri umleið fimtan árum síðani havt stóran og alsamt vaksandi týding fyri almennu og altjóða fatanina av hvali, kópi og veiðu av hesum sløgum. Sum tjóðir, ið tilskila sær rætt til at troyta havsins livandi tilfeingi á ein burðardyggan og ábyrgdarfullan hátt hava limalondini stóran tørv á vísindaligum dátum, ið kunnu mynda støði undir burðardyggum veiðipolitikki og stovnsrøkt.

Men hetta evnið snýr seg sjálvsagt ikki bert um veiði og veiðipolitikk. Hetta snýr seg um okkara felags ábyrgd fyri havumhvørvinum og fyri varðveitingini av teimum súgdýrum, ið finnast í Norðurhøvum. Á hesum øki hava londini kring Norðuratlantshavið eina serstaka og stóra ábyrgd. Arbeiðið við burðardyggum veiðipolitikki snýr seg tí um dygga og vísindaliga grundaða stovnsrøkt, um eftirlit og um hugburð. Havsins ríkidømi, tað veri seg fiskur, súgdýr, skeljadýr, smádýr, mikroorganiskur ella tari og havplantur – alt hetta margfeldið ger okkum menniskju ríkari í sinni og huga, umframt at alt gongur inn í størri og smærri heildir. Vit hava tískil skyldu at tryggja varðveiting eins væl og vit hava rætt at nýta ríkidømi við vinnuligum endamál, so leingi vit gera hetta á burðardyggan og ábyrgdarfullan hátt. NAMMCO er eitt sera týðandi amboð í hesum høpi, og felagsskapurin ger eitt stórt og dygdargott arbeiði til tess at tryggja øll tey fyrilit, vit her hava nomið við.

Sosialurin

Vælferð og heilsutænastur í primera sektorinum

TURIÐ JACOBSEN
Ergoterapeutur

Nú hevur so visiónstorg verið um vælferð. Sum ergoterapeutur hava almanna- og heilsumál mín stóra áhuga. Havi seinastu árini starvast í ymiskum skipanum innan primera sektorin, sum veita tænastur til gomul og brekað, sum búgva í egnum heimi. Bæði út frá tí og við at fylgja við í, hvussu okkara grannalond skipa tænasturnar til fólk, sum orsakað av breki hava skerdan førleika, havi eg gjørt mær tankar um hetta økið hjá okkum.

Kjarnuvitanin hjá ergoterapeutum er uppvenjing og rehabilitering av fólki við skerdum førleika og starvast ergoterapeutar innan skipanir, sum veita hesar tænastur.

Føroya Kommunufelag var vertur fyri ráðstevnu um eldraøkið í Norðurlandahúsinum seinasta heyst. Sera áhugavert at hoyra, hvussu onnur útjaðarasamfeløg hava skipað seg á hesum økinum. Føroya Kommunufelag og útjaðarakommunur í okkara grannalondum høvdu samstarvast um evnið í nøkur ár. M.a. kom fram, at luttakararnir úr hinum londunum høvdu roynt at finna út av, hvussu eldraøkið virkaði í Føroyum og høvdu konkluderað, at tað var tað reina kaos. Júst somu fatan havi eg eftir at hava starvast innan eldra- og brekøkið í nøkur ár.

Stórur politiskur og almennur vilji er til at bøta um tænasturnar til gomul og brekað. Eingin ivi er heldur um, at allar skipanir, sum veita hesum borgarunum tænastur, gera sítt besta og dentur verður lagdur á at laga tænastuna til tørvin hjá borgaranum. Starvsfólk í hesum tænastum tosa mangan um, at tær samstarva tvørfakligt, hetta hóast tær í nógvum førum einans hava ein fakbólk at veita tænasturnar, tvs. tær eru monofakligar - skipanirnar tykjast onkursvegna bert at hava eygu fyri tørvinum á tí eina fakbólkinum, hesin vísir seg ofta at hava somu fakligu bakgrund sum leiðarin í skipanini, ella er fakbólkurin 'gamal' á marknaðinum og væl kendur í almanna- og heilsuverkinum og millum fólk annars. Líkist fyribrigdinum 'tá ein hondverkari skal loysa eina uppgávu og einans hevur ein hamara til taks, sær hann einans seymir'.

Tað, at skipanirnar eru so ymiskar og í nógvum førum monofakligar, ger, at fokusið onkursvegna hevur lyndi til at flyta seg frá borgaranum. Knappiliga er tað ikki borgaran, sum málið snýr seg um, men hvør skipan skal veita hvørja tænastu, hvussu samstarvið millum skipanirnar skal virka v.m - hetta fær í nógvum førum dám av dupultarbeiði, ein skipan biðjur eina aðra um at loysa onkra uppgávu fyri seg v.m. Onkuntíð verður staðfest, at uppgávan ikki kann loysast, tí júst hesum trupulleikanum hevur eingin ábyrgdina av at loysa. Her er tað at, fyribrygdið, 'borgarin dettur ímillum skipanirnar' kann gera vart við seg - øll hava hoyrt um tað og ongum dámar tað. Augusta Mikkelsen, fysioterapeutur, skrivaði einaferð í viðmerking um barnaøkið, at tað ikki átti at komið fyri, at børn við breki 'duttu ímillum skipanir'. Hon hevur sjálvsagt rætt, um fokusið verður hildið á borgaran og ikki skipanirnar, hendir hetta ikki. Hvussu ber tað so til, at hetta hendir aftur og aftur í Føroyum?

Fyrst til nakað so keðiligt sum pengar, tí pengar skulu jú til at gjalda øllum hesum starvsfólkunum í øllum hesum skipanunum fyri alt hetta stríðið at halda skútuni koyrandi og halda skil á, hvat mín skipan, tín skipan, skipanin hjá hinum v.m. skal gera. Hvar koma hesir pengarnir so frá - jú mín sann, talan er um skattapengar frá føroyskum borgarum, bæði tá talan er um kommunalar skipanir, almennar skipanir við landsdekkandi funktión, almennar skipanir við økisuppdeildum funktiónum, sjálvsognarstovnum v.m. Fyri at tað ikki skal vera lygn, er talan eisini um somu borgarar, sum fáa tænasturnar, sum hesir skattapengar - kommunalir ella almennir - fíggja. Tvs. talan er um pengar frá somu skattgjaldarum, sum fíggja tænastur til sama skara av borgarum. Tí má tað bera til at beina hetta fíggjarliga - og fakliga - tilfeingið, so tað verður gagnnýtt sum best fyri allar borgarar við skerdum førleika.

Sum ergoterapeutur í primera sektorinum upplivdi eg tað sum ein avbjóðing í sær sjálvum at finna út av, hvør skipan hevði ábyrgd av hvørjum og at finna út av, hvønn leiklut eg hevði í øllum hesum. Mínar royndir stava frá Hjálpartólamiðstøðini (HTM), Dagstovninum á Lágargarði og Heimatænastuni, tað sum eg beit merki í og undraðist yvir var, at eg hitti somu borgarar í øllum skipanunum, tænasturnar vóru í nógvum førum treytaðar av hvørjari aðrari, men hoyrdu til heilt hvør sína skipan, sum var skipað undir hvør sínum leisti.

Setti mær tí fyri at royna at lýsa í hesum organisatiónsdiagrammi, hvussu allar almennar og kommunalar tænastur til heimabúgvandi borgarar við skerdum førleika yvir 18 ár, sum búgva í Suðurstreymoy, eru skipaðar. Eg skal ikki siga, at alt er púra rætt - uppgávan vísti seg at vera rættiliga avbjóðandi og haldi eg, at úrslitið er áhugavert og talar fyri seg. Havi sett spurnartekin við ellis- og røktarheim - ábyrgdin av hesum tykist at vera bæði kommunal, almenn og í onkrum førum hevur eitt stýri eisini ábyrgd. Mín telduførleiki rakk ikki til at gera diagrammið á teldu.



Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.